## Stór leiðararáðstevna í Norðurlandahúsinum



Í døgunum 13. og 14. november verður ein sonevnd leiðararáðstevna í Norðurlandahúsinum. Stevnan hevur heitið Global Leadership Summit ella GLS, sum hon eisini verður rópt. Í fjør savnaðust 400 kvinnur og menn til hesa stevnu, har tey fingu íblástur til at leiða, har tey starvast. GLS-leiðararáðstevnan hevur sín íblástur úr Amerika, og hon verður hildin í fleiri londum um allan heimin. Hvørt summar savnar heimskenda kirkjan í Chicago, Willow Creek, menn og kvinnur við førleikum og royndum at geva teirra ískoyti til leiðslur. Tað eru hesir fyrilestrar, vit fara at hoyra og síggja á stórskíggja í Norðurlandahúsinum 13. og 14. november – við føroyskum undirteksti og føroyskum arbeiðshefti.

# Nógv færri høvuðsvinnuni



Talið av fiskimonnum og fiskafólki er nógv minkað seinastu árini

Mynd: Karstin Vang

**Ein fyrispurningur, sum Kári P. Højgaard hevur sett Jacobi Vestergaard, landsstýrismanni í fiskivinnumálum, hevur avdúkað, at út við ein triðingur færri fólk nú eru í okkara høvuðsvinnu**

VINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Kári P. Højgaard spyr...*



*... Jacob Vestergaard svarar...*

Løgtingsmaður Sjálvstýrisfloksins, Kári P. Højgaard, spurdi landsstýrismannin, Jacob Vestergaard, um landsstýrismaðurin 1) kann upplýsa hvørt ár sær, hvussu nógvir føroyskir fiskimenn vóru í vinnu við føroyskum fiskiskipum frá 2003 til og við 2008 – og hvussu nógv fólk starvaðust í fiskaarbeiði á landi í sama tíðarskeiði?

Í øðrum lagi spurdi løgtingsmaðurin, hvussu nógvir fiskimenn við føroyskum fiskiskipum eru givnir seinastu fimm árini, hvussu nógvir eru byrjaðir, og hvussu stórt er talið á útlendingum í fiskivinnuni á sjógvi og landi, uppgjørt fyri hvørt ár sær.

Í triðja lagi spurdi hann, um landsstýrismaðurin hevur eina metan av, hvussu tilgongdin av ungum fólki til útróðrar- og fiskiskipaflotan kann væntast at blíva komandi árini?

Í fjórða lagi, um tilgongdin av sjófólki í høvuðsvinnuni minkar, og um landsstýrismaðurin sær hetta sum eina hóttan móti vælferðini og okkara lívsgrundarlagi?

Í fimta og seinasta lagi spurdi løgtingsmaðurin, um landsstýrismaðurin hevur nakrar ætlanir um at taka spurningin upp við Mentamálaráðið um, at ung kunnu fáa kjans við fiskiskipi sum skúlatilboð.

### Stór minking

Í svari sínum til Kára P. Højgaard, sigur Jacob Vestergaard, at talið av fiskimonnum við føroyskum skipum árini 2003 til og við 2008 hevur verið hetta: 2003 (2750 fiskimenn), 2004 (2525), 2005 (2474), 2006 (2406), 2007 (2188) og 2008 (1837).

Hetta merkir, at teir 2750 fiskimenninir, sum vóru umborð á føroyskum fiskiskipum í 2003, bert vóru 1837 í 2008. Hetta er soleiðis ein minking við 913 fiskimonnum, sum svarar til ein triðing av talinum í 2003

Landsstýrismaðurin vísti eisini í síni svari á, at talið av fólki í fiskaarbeiði á landi í sama tíðarskeiði, árini 2003 til og við 2008, hevur verið: 2003 (2433), 2004 (2199), 2005 (1911), 2006 (1968) 2007 (1918) og í 2008 (1665).

Hetta merkir, at tey 2433 fiskafólkini, sum starvaðust kring landið í 2003, vóru 768 færri í 2008.

Landsstýrismaðurin, Jacob Vestergaard, upplýsir í sínum svari, at arbeiðsmegin innan greinina ali-og kryvjivirki er ikki roknað upp í hesi tølini.

Sosialurin fer at venda aftur til fyrispurningin hjá Kára P. Højgaard og svarið hjá landsstýrismanninum, Jacobi Vestergaard.